# Nøvn



## In memoriam

Nicodemus Rasmussen andaðist á Tjarnargarði mánadagin 17. januar 92 ára gamal. Hann var ættaður av Strondum, og sum blaðungur fór hann til Havnar og fekk starv á skrivstovuni hjá Skipafelagnum Føroyar.

Í Havn læt upp ein nýggjur danskur almennur stovnur 1. apríl 1939, sum fekk heitið Færøernes

Oppebørselskontor, og har fekk Rasmussen fast starv 1.mars 1940. Tá starvaðust fylgjandi fólk á Uppibørselskontórinum ella Gjaldstovuni, sum stovnurin vanliga varð kallaðu millum fólk: Niels Mortensen, skrivstovustjóri, Sigfried Skaale, høvuðsbókhaldari, Hans Pauli Hansen, kassameistari, Joen Heini Hansen, bókhaldari, Elisa M. Haraldsen, skrivstovukvinna og Joen Peter Johansen, skrivstovumaður.

Rasmussen varð støðufastur á Færøernes Oppebørselskontor, sum gjørdist landsstovnur 1.apríl 1948

við lógfestum navni Føroya Gjaldstova. Har var hann skrivstovumaður í 8 ár, høvuðsbókhaldari Í 8 ár, fulltrúi í 5 ár og skrivstovustjóri í 27 ár. Hann var riddari av Dannebrog.

Hann, ið hetta skrivar, hevði tað lukku og gleði at starvast saman við Rasmussen í 31 ár. Hann var ein sera siðiligur, dámligur og skilagóður embætisbróðir. Altíð góður í ráðum. Hansara arbeiðssemi var stórt og góða minni hansar ótrúligt.

Tað er honum nógv fyri at takka, at Føroya Gjaldstova gjørdist ein virðiligur og vælvirkandi almennur stovnur, sum umsat landskassan, ríkiskassan, skatt, toll og onnur almenn gjøld v.m.

Allar málsviðgerðir lógu trygt og professionelt í hansara hondum. Hansara loyalitetur mótvegis teimum politisku myndugleikunum í Tinganesi var ósvikaligur.

Avvarðandi hava mist ein góðan pápa, abba og langabba.

**Heri Mohr**

# Minning um Andreas Poulsen



*Ein vanlig sjón framvið síðulinjuni í Sarpigerði, táið annaðhvørt GÍ ella Víkingur spældu sínar heimadystir í fremstu deildini.*

Vit vita, at deyðin áhaldandi er í hølunum á okkum, og at foldarlívið er avmált. At vit hvør í sær ikki eru annað enn eitt lítið ljósblunk í gigantiska kosmiska ljóshavinum, ein løðarsteinur av mongum, sum slektirnar skulu ganga um, men ofta tykist tað okkum sum, at rationaliteturin svíkur hjá Honum, ið øllum valdar. Sum at ólag er á sjuntinum, ið stjórnar lívi og deyða. Tað kennist í øllum førum ørkemlandi fyri okkum vanligu deyðiligu, at deyðin so brádliga skal taka jarðiska lívið frá einum hálvthundrað ára gomlum manni, júst sum hann stendur í sínum blomstrandi gerandis gerningi og yrki.

Deyðsboðini av skyldmanninum Andreasi komu í hvussu er sum snarljós av heiðum himni. Ikki so frætt at eg vitsti, at nakað var áfatt, hóast bara fáir dagar eru gingnir síðan vit seinast tosaðu saman í telefonini. Tann dagin var hann hin sami bragdligi og fryntligi maðurin, sum vit kendu, og ørindini vóru at spyrja fyri onkadóttrina Marjuna, um eg kundi hjálpa henni við eini samrøðu, nú hon skuldi gera søguliga høvuðsuppgávu á miðnámsskúlanum, um politikk, - við serligum atliti til tjóðskaparrørsluna og Tjóðveldisflokkin. Vit hittust á Havnarskrivstovuni, og ríðin av spurningum avdúkaði beinanvegin, at hon var væl kálvfødd í evninum. Havi skilt, at tað gekst henni heilt væl, tað frætti eg frá ommuni, men tað kann kanska tykjast lítisvert í hesum døgum, nú pápin er farin um sýnuna alt ov ungur.

Nær er slektað. Eri trímenningur við tey bæði, Andreas og Poulu, úr hvør síni ætt. Hetta kemst av, at mamma er systkinabarn við pápar teirra Páll og Reinhold. Hóast strongurin er ymiskur, gongur leiðin aftur til eitt samankók í jørðildinum millum Áirnar í Syðrugøtu. Fyri oman Oyruna og í Úti Guttastovu.

Andreas var sonur Margith og Páll Poulsen. Hon er av Toftum og Páll var undan Gøtueiði. Tey settust niður undir Eiðinum, og har traðkaði Andreas sínar barnaskógvar. Hann mundi vera um fýra ára aldur, táið foreldrini keyptu húsini hjá Einari Tróndargjógv, oman fyri Toftina og fram við Júksnará. Har byrjaði av álvara eitt margfalt og litfagurt lív. Eitt lív í støðugari framsøkn, ein ferð, har tað altíð varð miðað eftir ítøkiligum málum.

Andreas gekk barnaskúlan yviri við Gjógv – Gøtugjógv – og síðani fór hann ta meiri ella minni obligatorisku leiðina til Fuglafjarðar fyri at røkka framhaldsprógvi. Eftir tað hevur hann roynt hvørt av sínum. M.a. var hann kranafórari á Skála, var til skips við "Sjúrði Tollakssyni", táið gøtumenn royndu seg í uppsjóvarvinnuni í Senegal, og ílegutreytað, hevði eg nær sagt, hevur hann sjálvsagt roynt seg í broytum, bulldozarum og gravkúm. Tað kjálkaðist líka sum uppi á honum, at akfør skuldu gerast ein týðandi partur av lívi hansara.

Langabbi okkara Poul Kristoffur Poulsen, sum gekk burtur undir krígnum, suður úr Borðoyarnesi, var fyrsti bilstjórin í Gøtu. Kommunan keypti ein bil í 1926, og seinri átti hann bilar sjálvur. Hann fekst m.a. við at flyta post ímillum bygdir. Sonurin Andreas, ið búsettist hinumegin Eiði, legði á sama bógvin við egnum bilum, og sonurin Páll tók yvir, táið hann var komin til mans. Viðurskiftini í postverkinum broyttust sum vera mann, flutningurin varð umskipaður, og stovnurin tók sjálvur yvir, á sama hátt sum eitt nú Strandferðslan, áðrenn aftur varð farið undir at liberalisera ella útlisitera, sum tað so flott eitur á nútíðarmáli.

Áðrenn Andreas fór undir egið virki, var hann virkin á ymsan hátt. At vera álitismaður í vinnu var honum ikki nógmikið, framfýsni og samfelagsmedvit gjørdu hann eisini áhugaðan í politikki og ikki minst fakfelagspolitikki. Sum slíkur gjørdist hann landskendur, táið stóra verkfallið var í áttatiárunum. Øll minnast myndirnar á skíggjanum, tá sýslumaðurin í Eysturoynni, Frimod Joensen, troppaði upp á havnarlagnum í Norðragøtu, og vildi hitta formannin í Gøtu Arbeiðarafelag. Tá trein ein bræsin unglingi fram úr rúgvuni, jarpur í hárferðini, og hann lá ikki omaná, hvør ið hann var, og hvør ið hansara støða var í konfliktini. Hann varði áhugamálini hjá arbeiðarafjøldini. Hann brendi ígjøgnum skíggjan. Í eftirsjónini má sigast, at júst hendan myndin avdúkaði hvussu paradoksal hin politiska støðan er í Føroyum. Har stóðu tveir tjóðveldismenn andlit til andlits. Í hvør sínari profession, annar í løgreglubúna umboðandi danska politivaldið í Føroyum, og hin verji hjá øðrum partinum í eini ósemju á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Hendan partin av lívinum hevði hann heldur ikki frá fremmandum. Ommubeiggi mín og abbabeiggi hansara, Óli Poulsen, sum gekk burtur undir seinru stríðsárunum, varð tikin av sosialistisku hugsjónini og var íðin fakfelagsmaður. Mær er annars sagt, at Andreas var ein sera konstruktivur fakfelagsbossur. Táið gøtumenn royndu at fóta sær aftur í uppsjóvarvinnuni, legði arbeiðarafelagið, undir hansara leiðslu, rygg til. Fíggjarliga. Tað er eisini ein partur av søguni um upp á seg fremstu vinnulívsbygdina í Føroyum.

Tað ber næstan ikki til at beskriva, at lýsa út í æsir, hvønn kolossalan týdning ítrótturin, serliga fótbólturin, hevur havt fyri bygdasamfelagið í Gøtu. Í mínum uppvøkstri í fimmti- og fyrra partin av sekstiárunum var kappróðurin alfa og omega. Hondbólturin mentist, meðan fótbólturin at kalla var ein viðfáningur, á sama hátt sum aðrar staðir í oynni. Um hetta mótið verður farið undir hitt nú so kenda stadion í Sarpigerði, og tey flestu kenna søguna haðani.

Andreas var so heppin, at hann gjørdist partur av hesi flóðaldu, sum í avgerandi mun hevur verið savningarmegin hjá gøtufólki. Veruliga grundstøðið varð lagt í sjeytiárunum, tá hin legendariski vestmannaoyingurin, Gisli, við militerari disiplin og presisión fór undir at venja nakrar ungar